# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað, sum skal til, er at føroyignar nema sær vitan, so vit hava meira varandi loysnir*

*Jón Bjarnason, svimjivenjari*




*Pauli G. Hansen og Pætur Dam Jacobsen síggjast her við Levi Hanssen millum sín. Teir tríggir vóru í fjør liðfelagar á Skála*

*Mynd: www.eb-streymur.fo*

# Pauli og Pætur til EB/Streym

**Við at styrkja um hópin við teimum báðum Skála-spælarunum tykist EB/Streymur longu nú hava fingið flestu brikkarnar í hópinum upp á pláss**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í EB/Streymi kundu tey í gjár seta nøvn á tveir spælarar, sum skulu styrkja um hópin hjá greipuvinnarunum.

Talan er um Paula G. Hansen og Pætur Dam Jacobsen, sum báðir hava spælt við Skála undan hesum. Pauli G. Hansen hevur ongan tíð áður umboðað annað felag, og sambært egnari útsøgn var ein uppringin frá Alex Ferguson tað einasta, sum kundi fáa hann at skifta felag. Men kanska vigaðu orðini hjá Sigfríði Clementsen og Magna Mohr eins nógv kortini.

Pætur hevur sína uppaling í HB, men hann spældi eisini við AB, áðrenn hann fyri trimum árum síðani valdi at flyta inn á Skála.

### Styrkja miðvøllin

Tað er lítil ivi um, at talan er um góðan styrk til miðvallarplássini, nú teir báðir hava skrivað undir við EB/Streym.

Enn hevur Mikkjal Thomassen ikki gjørt av, um hann tekur eitt ár afturat við EB/Streymi, men í Paula G. Hansen tykist Skála hava fingið eitt serstakliga gott alternativ til sentrala miðvøllin. Pauli, sum er 28 ára gamal, hevur í fleiri ár verið roknaður sum ein av bestu miðvallarunum í landinum, og hann hevur eisini nakrar landsdystir á baki.

Og við at knýta Pætur Dam Jacobsen at hópinum hevur EB/Streymur somuleiðis skapt sær fleiri alternativ á miðvøllinum. Í fjør skiftust Levi Hanssen og Bárður Olsen um at røkja bakkplássini, men báðir eru teir meira upplagdir sentralt, og tilgongdin av Pæturi loysir í stóran mun upp fyri tí møguleikanum. Pætur, sum er 25 ára gamal, hevur eina ferð umboðað Føroyar á landsliðnum. Hetta var í 1-0 tapinum móti Rumenia í ár.

Enn eru einstøk ivamál í hópinum hjá EB/Streymi, men við tilgongdini av hesum báðum umframt leingjanini av sáttmálunum hjá trimum øðrum spælarum tykist felagið longu nú vera somikið væl ávegis, at tað stendur hinum liðunum greitt, at meistararnir verða eins ringir at basa í 2009, sum teir hava verið tað í 2008.

# Kappingin verður nú eftirmett

**Fótbóltssambandið fer komandi vikuskiftið at hava árliga eftirmetingarfundin við feløgini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skráin fyri fundin er nú løgd út á heimasíðuna hjá FSF, og her framgongur, at lagt verður upp til breitt kjak um kappingina.

Sum kappingin í ár endaði – um hon er endað – er verandi kappingarleisturin eitt av evnunum, sum fær sína viðgerð. Og kjakið her fer helst at geva sína fyrstu ábending um, hvønn vegin feløgini vilja ganga í hesum spurninginum.

Eisini verður skipanin við flytingarvindeyganum umrødd, umframt at tosað verður um skipanina við kortum og leikbannum. Her hevur verið ført fram, at tað er ov langt til fyrsta leikbannið, tá fimm kort skulu til.

Fundurin byrjar leygardagin klokkan 10, og kunnu feløgini senda trý umboð hvør á fundin.

## Martins feldi Villa

Tvey mál av Obafemi Martins vóru nóg mikið hjá Newcastle, sum í gjár vann 2-0 í heimadystinum móti Aston Villa.

Tað hevur annars ikki gingið nakað serligt hjá Newcastle hetta kappingarárið, men nú tykist vend verið komin í. Í øllum førum hevur liðið nú vunnið tveir dystir á rað, men tað tók sína tíð, áðrenn teir fingu bilbukt við Aston Villa í gjár.

Fyri steðgin misnýttu teir svørt/hvítu fleiri góðar møguleikar, men á tímanum skoraði Martins til 1-0, og tá smáir 10 minuttir restaðu legði Konas Guiterrez upp til seinna málið hjá nigerianska framherjanum.

Við sigrinum lyfti Newcastle seg upp um niðurflytingarstrikuna. Aston Villa kundi við einum sigri lyft seg upp á triðja plássið í Premier League.

**-mørk**

## Champions League í kvøld

Fjórða bólkaumfarið í Champions League-kappingini verður spælt í kvøld. Talan er um somu mótstøðulið, sum spældu í triðja umfarið, men tó hava liðini hesa ferð skift um heimavøll.

Dystirnir í kvøld eru: Cluj Napoca-Bordeaux, Roma-Chelsea, Anorthosis Famagusta-Inter, Werder Bremen-Panathinaikos, Sporting Lissabon-Shakhtar Donetsk, Liverpool-Atlético Madrid, Marseille-PSV Eindhoven og Barcelona-Basel.

Á 3+ verður sent beinleiðis frá dystinum millum Liverpool og Atlético Madrid, og byrjar sendingin klokkan 19. TV2 Sport sendir beinleiðis frá dystinum millum Barcelona og Basel, og á Rás1 hjá Televarpinum kann fylgjast við dystinum millum Roma og Chelsea.

**-mørk**